# Oyggjablaðið næstu ferð: Skála

Á rundferð okkara kring landið steðgar Oyggjablaðið næstu ferð á Skála.

Lesið í hesum blaðnum millum annað:



Eilif:
**Eg var í knúsi**



Helena:
**Stutt viðgerð við góðum úrsliti**



Rudolf:
**- Vit byrja árla á morgni**



Oluf:
**- Vit smíða okkara egna útróðrarbát**



Regin:
**- Eg havi altíð arbeitt úti**



TRIVNAÐUR

*Borgararnir í Sjóvar kommunu sluppu at siga sína hugsan um trivnaðin í kommunu. Og sum skilst trívast teir væl*

# Stór semja um samstarv

**STRENDUR Næstseinasta leygardag skipaðu kommunan og kirkjuráðið fyri serligum trivnaðardegi á Strondum. Her varð trivnaðurin í kommunu, familju og kirkju viðgjørd**

Á degnum vórðu fleiri fyrilestrar hildnir um hesi trý evnini, eins og fólk fingu høvið at práta saman um hesi týðandi viðurskiftini í eini kommunu.

Millum tiltøkini á degnum var eitt spurnarblað býtt út, har tey 250 fólkini, sum vóru við trivnaðardagin, skuldu svara nøkrum spurningum. Íalt komu 149 svar inn.

Millum spurningarnar var ein um, hvørt Sjóvar kommuna skal samstarva ella leggja saman við grannakommununum.

Her var støðan hjá teimum spurdu púra greið. Í fyrsta lagi søgdu tey flestu, at tað er týdningarmikið at kommunan samstarvar við grannakommunurnar.

Hugurin at leggja saman við grannakommunum er ikki eins stórur og hugurin at samstarva. 95 teirra vóru nøgd við at verandi støðu og 12 ónøgd. Hinvegin hildu nógv tey flestu at hetta málið hevur stóran týdning.

Tá talan kom inn á samanlegging við grannakommunurnar var støðan eitt sindur broytt: Her vóru 56 teirra nøgd við verandi støðu og 19 ónøgd. Hinvegin mettu 69 at spurningurin var týdningarmikil, meðan 30 ikki hildu tað sama.

Strandingar eru eisini heitir fyri at fáa Skálafjarðartunnilin framdan í verki. 126 av teimum 149, ið svaraðu spurnarblaðnum, halda hetta vera av stórum týdningi, 1 helt ikki, meðan 4 svaraðu líkamikið uppá spurningin.

Haraftrat vóru 82 teirra ónøgd við verandi støðu, og síggja helst fram til dagin, tá koyrandi verður av Skálafjørðinum til Havnar.

- Úrslitið av øllum teimum 19 spurningunum, ið settir vórðu, gávu okkum eina góða ábending um hvat borgarin heldur um støðuna, verður sagt úr Sjóvar kommunu.

snorri@sosialurin.fo

# Stóð ikki á at manna nevnd

**SUMBA Áhugin fyri at stovna Sumbiar Sóknar Fornminnisfelag fríggjakvøldið var sera stórur. Íalt møttu 25 fólk á fundi, og tað stóð ikki á at fáa nýggju nevndina mannaða**

Á fundinum varð tosað aftur og fram um, hvussu ein kundi røkka endamálinum, sum eisini inniber at finnast skal ein hóskandi bygningur at goyma fornlutirnar í sóknini.

Endamálið við fundinum er at seta á stovn og reka eitt savn fyri fornlutir av øllum slagi, og at varðveita bygningar, bygdarløg, fiskastykki og annað sum hevur søguligan týdning fyri bygdina.

Tað hevði somuleiðis eydnast teimum at fáa gestir við á fundin. Hesir vóru Jógvan K. Mørkøre frá Eiðis bygdasavni, Mortan Holm frá Þorkeris Bygdarsavni, eins og Einar Larsen frá Tvøroyri og eitt umboð fyri Sjósavnið greiddu frá, hvussu arbeitt varð á hesum støðum.

Á fundinum varð ein nevnd vald, sum skipaði seg við Eyðun Vestergaard sum formanni.

Næstformaður er Sólfinn Gudmundssen, peningarøkil Sigmund Vestergaard, skrivari Meibritt úr Hørg og Fróði Thomsen er nevndarlimur.

Nevndin fer til verka beinanvegin og fer at kalla saman til aðalfund sum skjótast.



FORNMINNI

*Sumbingar fara nú at gera sítt til at fornminnini í bygdini verða varðveitt, og at ansurin fyri teimum verður vaktur*